## FAKTA UM BUllGUARD



Bullguard varð stovnað av Morten Lund og Theis Søndergaard í 2001. Visjónin hjá teimum báðum var at skapa eina vøru, sum kundi verja brúkaran á alnetinum. Fokus-bólkurin var frá byrjan breiðbandskundin, sum alla tíðina situr á netinum, og sum soleiðis støðugt er hóttur av virus, hackarum og sonevndu internet-ormunum.

Vøruskráin fevnir í dag um fýra kjarnuøki. Virus-verjur, Firewalls, Spam-filtur og On-line backup. Hartil er felagið júst komið á marknaðin við serligari virus-verju til fartelefonir.

Heini gjørdist partur av fyritøkuni í 2002. Hetta var um sama mundið, sum fyrsta útgávan av Bullguard varð send á marknaðin. Longu árið eftir hevði felagið fleiri enn 3 mió brúkarar. Talið av brúkarum veðrur í dag mett til 15 mió.

Felagið hevur í dag 61 fólk í starvi. Av hesum starvast 42 í Rumenia, 15 í Danmark og 4 í London, har felagið eisini er skrásett.

*www.bullguard.com*

## FAKTA UM HEINA

**Navn:** Heini Zachariassen
**Føddur:** 20. juli 1972+
**Hjúnastøða:** Giftur Maibritt Zachariassen
**Børn:** Barbara (8 ár), Bastian (5 ár) og Paula (6 mðr.)

**Útbúgving**

| | |
|---|---|
| 1991 | Avlærdur í Fossbankanum |
| 1994 | HH-prógv í Havn |
| 1997 | BA í handilsumsiting á Handilsháskúlanum á Vestursælandi |

**Starvsroyndir**

| | |
|---|---|
| 1997-2000 | Annar av eigarunum av Ecperience I/S - programmering og webdesign |
| 2000-2002 | Ein av stovnarunum og IT-ovasti á Virus112 A/S. Virus112 A/S varð í desember 2000 selt til EuroTrust |
| 2002-2006 | Stjóri á Bullguard Ltd. |
| 2006- | Forstjóri á Bullguard |

og brúkaraflatu á málinum hjá brúkarunum. Og tað er so eisini nakað, sum vit støðugt hava lagt okkum eftir. Soleiðis eru pakkarnir hjá okkum í dag at fáa á 15 ymiskum málum, og nú vit hava gjørt serstaka útgávu til fartelefonir, hevur hendan frá byrjan 28 ymisk brúkaramál.

### Fartelefonir næsta hittið

Júst marknaðurin við virus-verjum til fartelefonir er nakað, sum Heini sjálvur sær sera stórar møguleikar í komandi árini. Møguleikar, sum eisini eiga at verða troyttir, um felagið áhaldandi skal røkka sínum »benchmark« um at tvífalda søluna á hvørjum ári.

– Fartelefonir eru longu nú í ferð við at líkjast einum veruligum PC alt meira. Samstundis er marknaðurin í dag soleiðis háttaður, at talan bert er um tveir ymsar platformar, sum tykjast vinna allan marknaðin. Fortreytin fyri at eitt virus-álop veruliga kann gera um seg, er júst standardisering. Og tí meta vit heilt avgjørt, at marknaðurin um heilt stutta tíð fer at eftirspyrja okkara produktum á hesum marknaðinum, sigur altso føroyska ískoyti til bólkin av ungum stjørnuskotum innan danskt vinnulív.

# – Her er sera liviligt umborð

**Karl Hilmar Andreasen hevur siglt við Sundabergi í samfull 16 ár. Hann veit tí, hvat hann tosar um: – Jú, Sundaberg er eitt gott skip. Tað fær ikki verðið stórt betri, sigur hann, sum er 2. meistari umborð**

FISKISKAPUR
*Orð/myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*2. meistarin Karl Hilmar hevur verið við Sundabergi í samfull 16 ár. – Hetta er eitt gott skip, sigur hann*

**Klaksvík:** Tað er ein øgilig stákan her við Kósabrúnna seinnapartin mikudagin.

Fleiri trolarar liggja og landa, – teirra millum eisini ein av teimum stóru í landinum, Sundaberg.

Hann kom aftur av sínum seinasta túri leygardagin í farnu viku, og riggar nú til at fara annan túr og á aðra leið enn frammanundan.

Túrurin royndist sera væl, og enn er ikki liðugt at fáa alla veiðuna í land. Tað stríðast landararnir við beint nú, og teir noyðast at skunda sær: Kvøldið eftir er ætlanin at leggja til brots til fiskiskap aftur.

Umborð á skipinum eru aðrir menn til arbeiðis. Í høllini har verksmiðjan er skal eisini eitt arbeiði gerast:

Tríggir mans eru í ferð við okkurt umvælingararbeiði á verksmiðjuni. Og í einum rúmi longur frammi er eisini okkurt arbeiði í gongd. Tað er her vit finna 2. meistaran, Karl Hilmar Andreasen úr Klaksvík.

Hann kom umborð á Sundaberg í 1990, og er sera væl nøgdur við bæði útgerð, amboð og kømrini umborð á trolaranum.

– Hetta kann neyvan verða stórt betri, sigur Karl Hilmar, sum í síni tíð eisini var 15 ár við Christian í Grótinum.

### Viðlíkahald

Karl Hilmar hevur siglt við Sundaberg tey seinastu 16 árini.

Tá hann skal lýsa hetta stásiliga farið, so krevjast ikki nógv orð til tað:

– Hetta er eitt stak gott skip, skal eg siga tær. Og sera liviligt umborð!

Arbeiðið hjá Karl Hilmari er fyri ein stóran part í maskinuni, og hesar umstøðurnar eru eisini sera góðar.

Hóast Sundaberg hevur sløk 19 ár á baki, so kann hann fegnast um, at maskinrúmið er og hevur altíð verið væl hildið viðlíka.

– Her eru somuleiðis góðar umstøður, sigur hann.

Umframt arbeiðið í maskinrúminum hevur Karl Hilmar eisini sítt at gera frammi í fabrikkini.

### Á frívakt

At vera umborð á skipi merkir tað sama sum at øll manningin gongur í føstum vaktum – ein tíð at arbeiða í og ein tíð sum frívakt.

Tey nýggjaru skipini hava øll útvegað sær tól og amboð, soleiðis at manningin hevur fleiri møguleikar at stytta sær stundir við enn áður.

Tað hevur reiðarí'ið hjá Sundabergi sjálvandi eisini syrgt fyri.

Umborð er bæði uppihaldsstova við sjónvarpi og tónleiki, og verður henda nógv brúkt í tí sambandinum.

Til aðrar tíðir spæla menninir nógv kort og dámar Karl Hilmari sera væl, tá ein sjavsur er á skránni.

### Fótbóltur og tíðindi

Tá teir eru lidnir við kortspælið og hava hug at royna okkurt annað, so eru eisini møguleikar til tess.

– Vit hava eisini parabol, so vit síggja eina rúgvu av kanalum. Her dámar mær serliga væl at hyggja eftir fótbólti og tíðindum, sigur hann.

Aldursspennið í manningini er rættiliga stórt. Sjálvur metir Karl Hilmar seg at vera 3. ella 4. elstan umborð.

Fleiri yngri eru eisini við, men tað er ikki nakað sum darvar arbeiðinum.

– At hava ungfólk við umborð, – tað er fínasta slag. Tey eru so lívlig, so tað er bara stuttligt at vera saman við teimum, sigur Karl Hilmar við einum brosi.

### – Eitt gott lív

Karl Hilmar hevur sum nevnt verið umborð á Sundabergi síðani 1990.

Men tá hann skal líta aftur um bak, so kann hann staðfesta at hann hevur verið til skips í meiri enn 40 ár av lívi sínum.

– Eg havi faktiskt verið við skipum síðani 1961. Ja, tað verða nøkur ár tilsamans, sigur hann við einum brosi.

Hóast onkur vil halda, at hetta við sjólívinum er bæði hart, keðiligt og einsformigt, er hann ikki samdur í tí.

– Eg kenni so ikki til nakað annað. Hetta hevur verið eitt gott lív!, sigur Karl Hilmar.

Nei, hann má aftur til arbeiðis. Tíð er pengar, tá ein skal rigga eitt skip til.

Góðan túr. Góðan fiskiskap!



*Líka síðani 1961 hevur Karl Hilmar verið á sjónum. – Eg kenni ikki til nakað annað enn hetta lívið, sigur hann*

## Á nýggjan túr ímorgin

Sundaberg, sum er bygdur í 1988, kom aftur av fiskiskapi seinasta leygardag. Mikudagin riggaðu teir til at fara avstað aftur.

Stjórin í JFK Trol, Hanus Hansen upplýsti fyrrapartin ídag, at ætlanin er at mynstra umborð kl. 14 leygardagin. Og síðani verður farið til fiskiskap.

Sundaberg hevur havt sína kvotu í norskum sjógvi, men hon er uppfiskað. Tí verður farið í annan sjógv á hesum túrinum – Barentshavið.

Her eru tríggjar sonevndar sonur eftir at fiska í – Russiska sonan, Svaldbards sonan og Gráa sonan.